# Magni selir út

**Hálvt ár eftir at Magni Arge keypti partabrøv fyri tríggjar milliónir í Atlantsflog, hevur stjórin valt at selja helvtina av partabrøvunum. Keyparin er Atlantsflog, sum bjóðar 10 prosent meira enn marknaðarprísin fyri partabrøvini hjá sínum egna stjóra**

PARTABRØV
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

28. november í fjør fór almenna, føroyska flogfelagið á partabrævamarknaðin. Eftir drúgt, politiskt orðaskifti skuldi Atlantsflog loksins einskiljast. Í fyrstu atløgu blivu ein triðingur av partabrøvunum seld í fríari sølu á keypsskálanum. Nú skuldu føroyingar og útlendingar, høg sum lág, á jøvnum føti sleppa at seta nakrar sparikrónur í tjóðarstoltleika føroyinga, Atlantsflog.

Men tað var tó eitt lítið fyrivarni við fríu søluni. Í fyrireikingunum og seinni prospektinum fyri Atlantsflog varð ásett, at leiðslan og starvsfólk í Atlantsflog skuldu hava forkeypsrætt til í mesta lagi trý prosent av partabrøvunum. Hetta er rímiliga vanligt í samband við sølur av hesum slag, og motivið er sum oftast at geva leiðslu og starvsfólkum møguleika at fáa ávirkan á sítt arbeiðspláss og harvið vónandi eisini taka eitt eyka tak fyri fyritøkuna.

Ein av teimum, sum tók av og keypti partabrøv í sínum arbeiðsplássi var stjórin, Magni Arge. Hann keypti 11.494 partabrøv í Atlantsflog fyri ásetta marknaðarprísin, tilsamans tríggjar milliónir krónur. Kursurin á partabrøvunum í Atlantsflog var 261, tá tað varð skrásett á virðisbrævamarknaðinum.

Handilin er formliga skrásettur 30. november og er farin fram umvegis "sp/f 11. juni 2007", sum Magni Arge eigur 100 prosent. Ein annar, sum eisini trúi nógv upp á sítt arbeiðspláss, var hin stjórin í Atlantsflog, Marius Davidsen, sum keypti 3486 partabrøv fyri tilsamans 909.000 krónur. Hesir báðir mynda í felag leiðsluna í Atlantsflog.



*Stjórarnir í Atlantsflog, Magni Arge og Marius Davidsen, hava selt helmingin av partabrøvum sínum í Atlantsflog til Atlantsflog fyri 10 prosent meiri enn marknaðarvirðið. Tað gevur teimum 157.290 krónur meiri í lumman, enn teir annars høvdu fingið við at selt til marknaðarprís*
*Savnsmynd*

### Tilboðið

Hósdagin 3. apríl var aðalfundur í Atlantsflog. Til aðalfundin ynskti nevndin í Atlantsflog at fremja eina broyting í viðtøkunum fyri felagið, sum heimilar nevndini at keypa egin partabrøv, tað vil siga partabrøv í Atlantsflog. Nevndin ynskti at fáa heimild at keypa egin partabrøv fyri ein kurs, sum kundi liggja millum 100 og 300. Men so víðar heimildir fekk nevndin tó ikki frá aðalfundinum, sum í staðin samtykti, at nevndin kann keypa egin partabrøv fyri ein kurs, sum ikki víkir meira enn 10 prosent frá marknaðarkursinum.

Beint eftir aðalfundin grundgav Christian Andreasen, nevndarformaður í Atlantsflog, soleiðis fyri nýggju heimildunum hjá nevndini:

- Tað er ikki nøkur beinleiðis frágreiðing til viðtøkubroytingina. Tað er meira í trá við ta praksis, sum er hjá feløgum, ið eru skrásett á virðisbrævamarknaðinum, at tey hava eina slíka áseting í viðtøkunum. Tað liggur einki annað aftan fyri tað, sum so.

Tað segði Christian Andreasen í beinleiðis samrøðu við Rás2 4. apríl. Og nevndarformaðurin helt fram:

- Also. Áðrenn nevndin kann keypa egin partabrøv, so skal felagið gera innanhýsis reglur um, nær tað kann gerast, hvussu tað kann gerast og við hvørjari grundgeving. So tað er ikki nakað, sum liggur í kortinum her og nú, at vit fara at gera. Hatta er meira at hava sum eitt instrument, sum ein møguleika, í framtíðini.

Instrumentið, møguleikin at nýta í framtíðini, bleiv longu brúkt mikudagin 18. juni.

### Atlantsflog bjóðar

Fyrradagin, mikudagin 18. juni, keypti Atlantsflog tilsamans 11.111 partabrøv í í Atlantsflog. Tað hevur nevndin heimild til, sambært viðtøkunum á aðalfundinum 3. juni. Mikudagin, tá handilin varð skrásettur á norðurlendska keypsskálanum, var kursurin á partabrævinum hjá Atlantsflog 219. Kortini velir nevndin í Atlantsflog at keypa egin partabrøv fyri kurs 240. Hetta er innan fyri viðtøkubroytingarnar á aðalfundinum 3. apríl, sum jú loyva nevndini at keypa egin partabrøv fyri ein kurs, sum í mesta lagi kann víkja 10 prosent frá marknaðarkursinum.

Tveir av seljarunum eru stjórarnir í Atlantsflog, Magni Arge og Marius Davidsen. Magni Arge selir henda dagin tilsamans 5.747 partabrøv fyri kurs 240, tilsamans 1.379.280 krónur. Hetta er júst helvtin av partabrøvunum, sum Magni Arge eigur í Atlantsflog. Sama dag selir Marius Davidsen tilsamans 1743 av sínum partabrøvum í Atlantsflog, somuleiðis fyri kurs 240. Tilsamans 418.320 krónur. Eisini hjá Marius Davidsen er talan um júst helvtina av hansara partabrøvum.

Harvið hevur ovasta leiðslan í Atlantsflog í einum og sama umfari selt helvtina av sínum partabrøvum í felagnum, tilsamans 7490 partabrøv fyri 1.797.600 krónur. Sølukursurin er 240, samstundis sum dagskursurin er 219, og harvið hava stjórarnir fingið 157.290 krónur meira fyri síni partabrøv enn tey vóru verd, tann dagin, sølan fór fram. Magni Arge fekk 120.687 krónur, Marius Davidsen 36.603 krónur. Keyparin er, sum nevnt, í báðum førum arbeiðspláss teirra, Atlantsflog.

Hetta eru tó ikki tey einastu av egnu partabrøvunum, sum Atlantsflog keypir henda dagin, 18. juni. Tilsamans keypti Atlantsflog 11.111 av sínum egnu partabrøvum fyri kurs 240.

Nevndarformaðurin:
## Leiðslan vildi selja

Christian Andreasen, nevndarformaður í Atlantsflog, váttar at tað var leiðslan sjálv, sum ynskti at selja part av sínum partabrøvum. Hann vil ikki útgreina, hví leiðslan ynskti at selja.

- Nevndin metti út frá eini samlaðari meting, at tað er skilagott at Atlantsflog keypir nøkur partabrøv aftur frá leiðsluni, sigur Christian Andreasen.

Spurdur, hví Atlantsflog hevur valt at keypa 11.111 av sínum egnu partabrøvum, sigur nevndarformaðurin, at tað er gjørt út frá eini samlaðari meting.

- Talan er eisini um eina lutfalsliga lítla íløgu fyri Atlantsflog, ið vit avgjørt meta at fáa aftur. At vit so geva leiðsluni eitt sindur meira fyri partabrøvini kann eisini síggjast sum eitt slag av bonus, sigur Christian Andreasen.

Í sama viðfangi hevur Atlantsflog gjørt av, at í framtíðini kunnu leiðandi starvsfólk í felagnum ikki keypa partabrøv í fyritøkuni uttan við loyvi frá nevndini.

Tað einasta, sum er fráboðað norðurlendska keypsskálanum, eru handlarnir, sum Atlantsflog hevur gjørt við Magna Arge og Marius Davidsen. Teir eru leiðsla í felagnum, og tí er slík fráboðan eitt lógarkrav.

## FAKTA

Fýra persónar hava um dagarnar selt helvtina av sínum partabrøvum í Atlantsflog til Atlantsflog, tilsamans 11.111 partabrøv fyri kurs 240. Talan er um ovastu stjórnar, Magna Arge og Marius Davidsen, umframt ovastu persónarnir í teknisku leiðsluni. Allir fýra hava selt eftir sama leisti, tvs. helvtina av sínum partabrøvum í fyritøkuni fyri kurs 240. Handilin fór fram mikudagin 18. juni 2008, tá kursurin á partabrævinum í Atlantsflog annars var 219.

# Palliba fekk einki tilboð

**Landsins myndugleikar fegnaðust um, at so nógvir føroyingar valdu at seta pengar í, tá fyrsti triðingurin av føroyska tjóðarstoltleikanum varð seldur. Hálvt ár seinni er kursurin væl lægri, og leiðslan hevur selt helvtina av sínum partabrøvum**

PARTABRØV
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Ein hornarsteinur í einskiljingartilgongdini av Atlantsflog varð rokkin 29. november í fjør, tá fyrsti triðingurin av tjóðarstoltleika Føroya varð seldur á virðisbrævamarknaðinum. Landsins myndugleikar staðfestu, at øll partabrøvini, sum vóru lýst til sølu, blivu seld í ásetta tíðarskeiðnum, sum var 19. til 27. november 2007.

Tilsamans 1370 íleggjarar valdu at seta pengar í føroyska flogfelagið. Sølan varð ikki marknaðarførd uttanlands, og tí eru tað í høvuðsheitum føroyingar, sum hava keypt partabrøv, hóast útlendingar vóru millum íleggjararnar.

Sonevndir "størri íleggjarar" keyptu 180.959 partabrøv, "minni íleggjarar" keyptu 139.380 partabrøv, meðan "starvsfólk hjá Atlantsflog" keyptu 21.211 partabrøv í føroyska flogfelagnum. At partabrøvini eru býtt á nógvar og smáar íleggjarar sæst millum annað í ársfrágreiðingini fyri 2007. Hon staðfestir, at umframt landsstýrið er bara ein partaeigari, sum eigur meira enn fimm prosent av partabrøvunum í Atlantsflog. Talan er um "sp/f 7. desember 2007". Hetta er eitt smápartafelag, hvørs endamál er at gera íløgur í virðisbrøv, og sum hevur Eyðfinn Jacobsen, advokat, sum stjóra.

Endaliga prísásetingin var 261 krónur fyri hvørt partabræv, og triðingurin av partabrøvunum góvu tí eigaranum, sum var landskassin, 89,1 milliónir krónur. Men kursurin helt sær ikki leingi á 261. Í januar kom kursurin eitt skifti niður á 175, men hevur síðani kvinkað nakað uppeftir og er nú 219.

### Starvsfólkini

Í allari einskiljingartilgongdini var dentur lagdur á, at starvsfólkini skuldu sleppa at keypa sín part av felagnum. Slíkt er ikki óvanligt í samband við einskiljingar, og endamálið er oftast at geva starvsfólkunum eitt herðaklapp og ognarkenslur mótvegis sínum arbeiðsplássi. Og júst áhugin millum starvsfólkini fyri sínum arbeiðsplássi var nakað, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum beit merki í, tá sølan varð veruleiki.

"Vit fegnast um at skjótil nú er settur á einskiljingina av Atlantsflog. Vit meta, at nýggju partaeigararnir fara at fáa eina jaliga ávirkan á felagið og fegnast um, at so nógv av starvsfólkunum ynsktu at gerast partaeigarar."

Soleiðis segði Bjarni Djurholm, táverandi landsstýrismaður í vinnumálum, eftir einskiljingina. Í dag hevur ovasta leiðslan valt at selja helvtina av øllum sínum partabrøvum. Keyparin er Atlantsflog, sum enntá hevur bjóðað sínum stjórum 10 prosent meira fyri partabrøvini, sammett við dagsvirðið.

Samstundis ber til at staðfesta, at teir tilsamans 1370 íleggjararnir hava ikki fingið sama tilboð frá Atlantsflog, nevniliga at selja síni partabrøv í føroyska flogfelagnum fyri ein kurs, ið er 10 prosent hægri enn dagsins kursur.

**Sosialurin og Rás2 fylgja málinum**